

## Solskjær skorar 20 mál

Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, rósar norska álopsspælaranum Ole Gunnar Solskjær til skíggja eftir hansara avrik higartil í ár. Solskjær, sum er komin rættiliga fyri seg aftur eftir skaða, hevur longu gjørt fimm mál í Premier League.

– Ole klárar seg sera væl, og um hann heldur fram á hendan hátt – og tað fer hann at gera – so skorar hann 20 mál fyri okkum í ár, sigur Ferguson við heimasíðuna hjá Manchester United.

Umframt fimm mál í Premier League hevru Solskjær eisini skotið tvey mál fyri norska landsliðið seinastu dystirnar.

## Brøndby eyðmýkt av FC Midtjylland

Tað gongur einki hjá Brøndby í donsku superliguni, og eftir tapið um vikuskiftið liggur liðið mitt á stigatalvuni, har teir plaga at verða millum tvey tey fremstu. Sunnudagin spældi Brøndby á útivølli ímóti FC Midtjylland, og jútska liðið vann greiðan sigur. Úrslitið gjørdist 3-1, og tað var fult uppiborið, at tað betri skipaða og betri spælandi liðið vann dystin. FC Midjylld togaði seg upp á fimta pláss í superliguni, meðan Brøndby er nummar seks – sjey stig aftanfyri oddaliðið FCK.

# Liðini býttu stigini á Skála

**StÍF førdi mest sum allan dystin á Skála, men Kyndil megnaði at bjarga sær eina stigið ímóti endanum. Sjálvt um bæði liðini høvdu møguleika at avgera dystin í síðstu sekundunum, so vóru tey sum heild nøgd við javnleikin**



*StÍF førdi stórt í fyrra hálvleiki. Teir megnaðu tó ikki at halda vestmenningunum aftanfyri seg, og sum heild høvdu vestmenningar uppiborið javnleikin, tí teir kempaðu veruliga fyri stiginum.*

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Oddadystur var í høllini á Skála leygardagin, tá StÍF tók ímóti VÍF. Bæði liðini vunnu í fyrsta dystinum, og tí kann sigast, at hetta var ársins fyrsti oddadystur hjá monnunum.

Tað var eitt skaðarakt heimalið, sum møtti upp í høllini. Bæði Sveinur og Leivur Justinusen vóru ikki við vegna skaða. Sama trupulleika hevði Bárður Danielsen. Harafturat manglaði Artur Johansen, tí hann fekk beinleiðis reytt kort í fyrsta dystinum.

Vestmenningar vóru eisini illa raktir av skaðum, sjálvt um tað sá heldur betri út hjá teimum. Ingi Olsen og Agnar Joensen vóru ikki við vegna skaða, men annars var alt fólkið tókt.

### StÍF reyk avstað

Dysturin var ikki meir enn blástur í gongd, so sá man, hvønn veg tað bar. Dysturin var bert 10 minuttir gamal, so hevði StÍF lagt seg á odda við 5 málum, 7-2. Tað var týðiligt, at teir vóru sera uppsettir til henda dystin, og harafturat fekk Marian í málinum hjá StÍF eina sera góða byrjan.

Sum hálvleikurin leið kom VÍF tó betri við í dystin, og fimm minuttir fyri steðgin var munurin minkaður niður í trý mál.

Tað var ikki minst orsakað av eini góðari verju og einum vælleikandi Eli Müller í VÍF-málinum, at munurin ikki var størri enn hesi trý málini, og beint fyri hálvleik megnaði VÍF eisini at fáa eitt mál afturat, soleiðis at munurin nú bert var tvey mál. Hálvleiksstøðan var 12-10 til StÍF.

### Málverjarnir áttu seinna hálvleik

Høvdu málverjarnir báðir staðið væl í fyrra hálvleiki, so var heilt øðrvísi í seinna hálvleiki. Serliga í byrjanini vóru teir sannir brandar, og tað var til tíðir sera ringt hjá báðum liðunum at fáa bóltin í málið.

Leikliga var dysturin rættiliga rótutur hesa løtuna, og spælararnir gjørdu nógvar feilir. Hetta gjørdi eisini, at bæði liðini fingu fleiri møguleikar at renna skjótálop, men oftast bjargaðu Marian og Eli hvør í sínum lagi.

Sjálvt um málmenninir stóðu ein ótrúliga góðan dyst, so komu tó nøkur mál afturat, og hesa løtuna vóru vestmenningar omaná. Stóran part av hálvleikinum megnaðu strandingarnir at halda VÍF aftan fyri seg, men tá 10 minuttir vóru eftir bragdaði hjá vestmenningum. Tá komu teir upp á javnleik, og so var dysturin púra opin.

Eftir at VÍF var komið uppá javnleik, leikaði javnt á restina av dystinum, og VÍF var eitt skifti á odda. Men hvørja ferð kom StÍF aftur, og tá ein minuttur restaði av dystinum stóð á jøvnum 23-23.

### Hendingarríkur minuttur

Síðsti minutturin bleiv tó sera hendingaríkur. VÍF hevði bóltin, og líkt var til, at teir ætlaðu at nýta alla tíðina í hesum álopi. Hetta skuldi tó ikki vísa seg at henda. Vestmenningar mistu bóltin, og StÍF streyk avstað. Venjarin var tó skjótur at hála time out skiltið upp, og við bert 40 sekundum eftir at leika høvdu strandingar bóltin, meðan teir fóru út at tosa um tingini.

Nú var einki at ivast í, at strandingar fóru at leika tíðina út, og so royna at skjóta mál í allar síðstu sekundunum. Hetta var júst tað, sum hendi. Men enn einaferð gjørdu teir ein tekniskan feil, og so fekk VÍF bóltin.

Nú var teirra túrur at taka time out, og við bert níggju sekundum eftir at spæla høvdu teir bóltin á miðjum vølli. Teir kláraðu at spæla seg fram til ein opnan møguleika, men leikarin við bóltinum ivaðist ov nógv, og alt endaði við, at hann gjørdi álopsfeil, og so endaði dysturin við javnleiki 23-23.

Strandingar iðra seg helst mest um javnleikin, tí teir eitt skifti førdu við seks málum. Teir vóru tó ikki nóg neyvir í avgerðandi løtum, og hetta megnaðu vestmenningar at gera sær dælt av. Teir bardu seg upp á javnleik, og sæð yvir allan dystin, so var hetta eitt rættvíst úrslit.

## – Vit eru á rættari leið

Hjálparvenjarin hjá VÍF, Ingi Olsen, stóð á odda fyri VÍF henda dagin, tí Dia Midjord var burturstaddur. Ingi var sum heild væl nøgdur við úrslitið, og helt, at liðið nú er á rættari kós.

– Eg eri sum heild væl nøgdur við úrslitið. Vit hava altíð havt stórar trupulleikar her inni á Skála, og tí eri eg fegin um at hava fingið ein javnleik her. Sjálvt um Marian í StÍF-málinum gevur okkum stórar trupulleikar, so megna vit at sleppa aftur til Vestmanna við eina stiginum. Hetta haldi eg vera stórt fet rætta vegin, og eg vóni at liðið fer at blíva við at kempa sum í dag.

## – Fyrri hálvleikur kostar

Jakob Jónsson, venjarin hjá StÍF, er ikki heilt nøgdur við dystin. Hann heldur, at StÍF skal avgera dystin í fyrra hálvleiki.

– Eg eri ikki heilt nøgdur við javnleikin. Í fyrra hálvleiki føra vit við seks málum, og hetta skulu vit klára at halda. Her branna vit ov illa, og tað megna vestmenningar at gera sær dælt av. Í pørtum av dystinum eru vit eisini ov ótolnir og skjóta ov tíðliga, tá vit eru komnir í álop. Annars eri eg sera væl nøgdur við verjuna og Marian í málinum, so nú mugu vit bara stríðast víðari.

## FAKTA

**Málskjúttar StÍF:**
Finnur Hansson 7, Mortan Hansen 5, Jakob Jónsson 5, Terji Poulsen 3, Rúni Niclassen 1, Andre Danielsen 1, Jørmund Joensen 1
**Útvísingar StÍF:** 4

**Málskjúttar VÍF:**
Sámal Joensen 6, Harald Bjørgvin 3, John Zachariassen 3, Áki G. Olsen 3, Regin Joensen 3, Áki Müller 2, Sjúrður Poulsen 2, Rúni Joensen 1
**Útvísingar VÍF:** 4